# Brúðarmyndir

*Vit takka hjartaliga øllum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 1. okt. 2005.*
***Tina og Jóhan Isaksen***





*Hjartaliga takka vit øllum, ið við gávum, fjarritum og heilsanum mintust okkara hjúnabandsdag 6. aug. 2005.*
***Hansa og Thorbjørn***


Títt búmerki á klæðini
Vit brodera búmerkir og nøvn á
Jakkar
Keppar
Blusur
Húgvur
Handklæði
o.a.
Si-mona
Brodering
tlf 58 19 77
si-mona@si-mona.com



**Mentamálaráðið**
AÐALSKRIVSTOVAN

## Løgfrøðingur/Fulltrúi

**Starvið**
Í sambandi við, at ein av løgfrøðingum okkara fer úr starvi, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja í aðalskrivstovuni.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- Lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið.
- Løgfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til landsstýrismann, starvsfólk, stovnar og borgarar.
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín.
- Málsviðgerð.
- Kæruviðgerð.
- Aðrar uppgávur.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur løgfrøðiligt embætisprógv.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir úr øðrum starvi. Harumframt skalt tú bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum o.ø.

**Vit bjóða**

- Spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir.
- Sjálvstøðugt starv.
- Samstarv við royndar løgfrøðingar.
- Luttøku í løgfrøðiligum samstarvsmótum.
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, C.V. o.ø skal sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. mars 2006 kl. 16.00. Starvið verður at seta frá 1. mai ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50, ella vitja heimasíðu okkara www.mmr.fo

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

Í **aðalskrivstovuni** eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.



norden




pétur & pétur - 320870



**Ung í Føroyum**
**Sunnudagin 5. mars kl. 17.00**
Stór almenn sýning við úrslitunum frá verksmiðjunum hjá Ung í Føroyum. Atgongumerki kr. 50,-



**Sebastian**
**Mikudagin 8. mars kl. 19.30**
Her hevur tú møguleika at uppliva ein tann besta trubadurin, ið danir hava havt ígjøgnum ár og dag. Atgongumerki kr. 150,-



**Den harmoniske port**
**Mikudagin 17. mars kl. 19.30**
Ein simultan improviserandi konsert við tónleikarum úr Grønlandi, Danmark og Føroyum. Atgongumerki kr. 100,-
Børn/lesandi/pensionistar kr. 50,-



**Føroya Symfoniorkestur**
**Sunnudagin 19. mars kl. 16.00**
Konsert við Føroya Symfoniorkestri. Atgongumerki kr. 150,-



**Suð & Vokalkompagniet**
**Týsdagin 11. apríl kl. 19.30**
Vokalkompagniet er eitt lívligt kór, ið syngur alt frá jazzi til gospel. Suð er eitt kent kór í Føroyum og høvdu útselt eftir stutta tíð til ABBA-konsertina í 2005.
Atgongumerki kr. 150,-



**Povl Dissing & Benny Andersen**
**Sunnudagin 23. apríl kl. 16.00**
Konsert við Povl Dissing og Benny Andersen, - tveir av best dámdu undirhaldarum á danska tónleikapallinum. Atgongumerki kr. 150,-



**Konsert við Kristel og Jens Lisberg**
**Leygardagin 29. apríl kl. 17.00**
Hugtakandi konsert við bæði country, gospel, rock og ikki minst føroyskum tónleiki.
Kostnaður kr. 150,-



**Mozarts Requiem**
**Sunnudagin 7. mai kl. 16.00**
Konsert við Føroya Symfoniorkestri.
Atgongumerki kr. 200,-



**Skuolfi**
**Sunnudagin 9. mai kl. 19.30**
Kend joiku-opera eftir Harriet Nordlund.
Atgongumerki kr. 100,-



**Monrad & Rislund**
**"Den rene jammer"**
**Leygardagin 20. mai kl. 19.30**
Monrad & Rislund framføra eina røð av sera stuttligum sangum og sketsjum.
Atgongumerki kr. 150,-



**Henrik Ibsens "Lille Eyolf"**
**Týsdagin 30. mai 2006**
Det Kgl. Teater við Rasmus Botoft, Helle Faralid, Peter Gilsfort, Benedikte Hansen og Helle Hertz. Atgongumerki kr. 150,-

**Fleiri upplýsingar fáast á www.nlh.fo ella við at ringja 351 351**

NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Norðari Ringvegur • 100 Tórshavn • Tlf. 351 351 • Fax 351 350 • www.nlh.fo